# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eru framvegis í bíðistøðu

Stevið er gott í samgonguni. Tað kendi løgmaður seg skundaðan til at spæla út við á heimasíðuni hjá Tinganesi í gjár. Landsins stjórnarleiðari svaraði harvið oddagreinini, sum okkara kollegar á Dimmu høvdu í blaðnum mánakvøldið.

Stevið er gott. Tað var yvirskriftin hjá løgmanni. Áðrenn tað kann mestast um gongulagið, er tað neyðugt at fara til gongu, eins og tað ikki ber til at meta um áralagið, tá ið báturin framvegis ikki er flotaður.

Í næstu viku fer Obama at flyta inn í Hvítu húsini. Amerikanska pressan fer at friða hann í hundrað dagar. So verður hann lagdur á vektina og fer harvið at verða støðugt vigaður, inntil tað í november 2012 aftur fer at verða forsetaval.

Nýggja ABC samgongan er nú eina stóra viku eldri enn hundrað dagar. Tí er tað einki forgjørt í, um andstøða, pressa og almenningur smátt um smátt fer at fregnast eftir, hvat ABC samgongan ætlar.

Løgmaður vísti í gjár til samgonguskjalið, og í síðstu viku vísti løgmaður til Visión 2015. Síðani visiónin varð skrivað og síðani samgonguskjalið varð skrivað, eru fyritreytirnar í okkara samfelag og í altjóða samfelagnum nógv broyttar. Enn hevur einki verið at frætta um, hvussu samgongan við tí góða stevinum ætlar at takla nýggja veruleikan. Tíðin er neyvan til at seta nýggjar visiónsbólkar og nýggjar bólkar at tulka samgonguskjalið inn í spildurnýggja veruleikan.

Ein av fíggjarnevndarlimunum hjá samgonguni vísir nú á tað óhepna, at landsstýrið hevur eina íløguætlan, og at fíggjarnevndin hevur eina aðra. Einki forgjørt er í tí, um samgonga og andstøðu finna saman um eina íløguætlan. Men tað er vánaligt stev, um útinnandi valdið og lóggávuvaldið arbeiða hvør í sína ætt. Her eigur politiskt at verða arbeitt skjótt!

Ein annar av samgongulimunum sigur, at bátar undir 15 tons eiga at fáa loyvi at fiska frítt! Løgmaður vil hava enn eina skipanarnevnd at taka sær av uppgávuni at orða uppskotið til fiskivinnupolitikkin. Tað bendir ikki á, at talan fer at verða um politiskt yvirtíðararbeiði.

Kanska er stevið í samgonguni so gott, sum løgmaður vil vera við, at tað er. Nú fáa vit at síggja.

Týsdagin í næstu viku verður jólafrítíðin hjá tinginum av. Tað hevði klætt løgmanni væl, um tað beinanvegin vórðu løgd uppskot fyri lóggávuvaldið at arbeiða við. Um tað aftur hesa ferð fer at verða bíðað inntil fyrst í mars mánað at leggja uppskot á tingborð, so kann tað verða so skjótt, at tað fer at verða ivast í stevinum. Eftir meiri enn hundrað døgum eru vit framvegis í bíðistøðu.

**Sosialurin**

## Populistisk takling frá løgmanni



**BJØRT SAMUELSEN**
Løgtingskvinna

Tað er eitt grunt og ósakligt álop á eina undanfarna samgongu, tá Føroya løgmaður í tíðindaskrivi fortelur fólki at "politiska skipanin hevði mest sum ligið lamin í eitt hálvt ár vegna rumbul í CHE-samgonguni", tá ABC tók við.

Medvitað ella ikki, so misnýtir Kai Leo Johannesen eina mynd, sum er uppelskað av teimum, sum vildu CHE-samgonguni illa. Men sannleikin er, at CHE-samgongan fekk sjáldsama nógv av skafti uppá so stutta tíð!

**Óundirbygd myta**

Hvat meinar Føroya Løgmaður við, at politiska skipanin lá lamin? Arbeiddi Løgtingið ikki av fullum alvi við teim sera mongu málum, ið vórðu løgd fram?

Tað er ein myta, at CHE-samgongan var óarbeiðsfør. Tíverri fylti rumbul um eitt nú tunlarnar ov nógv í fjølmiðlunum. Men talan var um eina samgongu, sum tordi at taka eina røð av truplum málum til viðgerðar, heldur enn lata tey liggja (hvar eru tunlarnir nú?).

Niðanfyri er eitt úrval úr avrikslistanum hjá CHE. Æruna áttu vit ikki einsamøll, tí undanfarnar samgongur høvdu lagt lunnar undir fleiri mál. Men væl og skjótt varð gingið av ungari stjórn, sum løgmaður skýrir lamna!

**Varðar eftir CHE:**

- Størsta fetið ímóti møguleikanum at fáa góðkent okkara fiskiveiðu sum burðardygga.
- Barnsburðarfarloyvið longt við 8 vikum.
- Stakir uppihaldarar barnaískoyti á 6000 kr. eyka árliga fyri hvørt barnið.
- Samtykt at seta Brúkaraumboð á stovn og nýggja marknaðarføringslóg.
- FAS-stovnur settur á stovn og okkara altjóða skipaskrá gjørd meira kappingarfør.
- Latið varð upp fyri útlendskari arbeiðsmegi og Útlendingastovan sett á stovn.
- Fleiri hægri útbúgvingar vórðu raðfestar (tíverri nú steðgað).
- Miðnámsskúlin í Marknagili samtyktur (sum beint nú livir í óvissu).
- Kringvarpið fekk nýtt digitalt sendinet.
- Øktu játtanina til børn við serligum tørvi munandi.
- Fleiri pláss til lærara- og pedagogútbúgvingarnar og fleiri nýggj miðnámsskúlapláss í Eysturoynni.
- Endurgjaldsábyrgdarlógin varð samtykt.
- Játtanirnar til Mentanargrunn, tónleik, Tjóðpall og vinnugransking vuksu (hóast ikki nóg mikið).
- Grundleggjandi útgreiningararbeiði við fíggingarleistum og váðametingum varð gjørt fyri undirsjóvartunlarnar.
- Økisdepil og sambýli til sinnisveik vórðu samtykt.
- Vinnulóggáva dagførd og víðfevnda tryggingarlóggávan samtykt.
- Yvirtøkan av Vága Floghavn kom endaliga upp á pláss, so útbyggingin kann fara í gongd, og loyvi givið at seta á stovn tollfríða sølu á flogvøllinum.
- Uttanríkisráð varð bygt upp at røkja okkara altjóða vinnuligu, mentanarligu og politisku áhugamál.
- Arbeiðið at gera eina virkisætlan at minka um útlátið av veðurlagsgassum varð sett í gongd.

**Syftir seiðir**

Úrslitið av hesum seinast nevnda hevur ABC júst heystað við frágreiðingini "Skjótt syftir seiðir og tunga takið". Má í sama viðfangi harmast um, at ABC hevur tikið arkitektakappingina og ráðstevnu um orkuvinarliga bygging av skránni – vónandi bara fyribils. Pengar vórðu settir av til hetta á Fíggjarlógini fyri 2009, og fyrireikandi arbeiðið komið langt, tá CHE misti flogið.

Populistiska taklingin hjá løgmanni hevur uppiborið reytt kort!

## Kringvarpið einki skeivt gjørt



**ANNIKA MITTÚN JACOBSEN**
Stjóri fyri Kringvarp Føroya

Kringvarpið vísir aftur uppáhaldinum hjá Starvsmannafelagnum um, at Kringvarpið skal hava brotið setanarpolitikkin.

Allar reglur og ásetingar eru hildnar. Starvið sum journalistur hevur verið lýst leyst á framsíðuni á heimasíðuni www.kringvarp.fo í útvið ein mánaða, og harvið hava øll havt møguleika at søkja starvið, ið er sett sambært galdandi reglum. Somuleiðis vil Kringvarpið enn einaferð sláa fast, at ætlaðu sparingarnar ikki kunnu samantvinnast við setanina av journalisti. Henda setan varð framd, tí eitt starvsfólk á Degi & Viku segði seg úr starvi í november mánaða.

Eisini er tað beinleiðis skeivt, tá Starvsmannafelagið førir fram, at nærum eingin sparing fæst við at siga átta fólkum úr starvi. Kringvarpið hevur longu gjørt alt fyri at avmarka talið á uppsøgnum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13.30

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.